betri trygging

# Útleigutrygging til býli

*Ískoyti til tryggingartreytir fyri **Innbústrygging mars 2019.***

Fyri hesa tilvalstrygging eru somu felagstreytir og sama lógargrundarlag galdandi sum fyri Innbústrygging mars 2019.

## Tilvalstrygging til Innbústryggingina:

### 175.00 Útleigutrygging til býli

Tryggingin fevnir um skaðar, sum leigari ger á bústað og innbúgv í leigutíðarskeiðnum.

Tryggingin fevnir um leigutíðarskeið, sum vara í mesta lagi 30 dagar.

### 175.01 Tryggjaðir lutir

**Tryggingin fevnir um:**

**a)** Tryggingin fevnir um innbúgv hjá útleigara, sum fast er á tryggingarstaðnum, sum nevndur er á tryggingarskjalinum.

Við innbúgv er at skilja lutir, sum nevndir eru í grein 13.21 og 13.22 í Innbústryggingartreytunum.

**b)** Um bygningurin er tryggjaður hjá Betri Trygging, fevnir tryggingin eisini um útleigaða bygningin á tí tryggingarstaði, ið nevndur er á tryggingarskjalinum.

Við bygning er at skilja íbúðir, sethús og frítíðarhús, íroknað tilhoyrandi úthús, túnseting, terassu, urtagarðsøki, sóltjøld og uttandura hitapottar.

**Tryggingin fevnir ikki um:**

**a)** Skaða á gull, silvur, pening o.a., sum er nevnt í greinunum 14.05 til 14.20.

**b)** Útreiðslur hjá leigara og útleigara til endurhýsing.

**c)** Útreiðslur hjá útleigara til húsaleigutap.

### 175.02 Skaðaorsøkir

**Tryggingin fevnir um:**

**a)** Tjóvarí, sum leigari fremur.

**b)** Herverk framt av leigara.

**c)** Skaðar, sum leigari ger av óvart á lutir nevndir undir greinunum 175.01 a) og b).

**d)** Útreiðslur til at skifta lásið í úthurðini í bústaðinum, um leigarin hevur mist lykilin burtur ella um hann er stolin.

### 175.03 Skaðafráboðan

Tá skaði verður fráboðaður, skal galdandi leigusáttmáli ella annað prógv um leiguavtaluna latast okkum. Somuleiðis skal leigarin, sum var atvold til skaðan, vátta okkum hetta.

Er talan um tjóvarí ella herverk, skal løgreglan fráboðast og váttan um fráboðanina latast okkum.

### 175.04 Skaðauppgerð

Skaði á innbúgv verður endurgoldin samvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi innbústreytum hjá Betri Trygging.

Skaði á bygning verður endurgoldin samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi sethúsatreytum hjá Betri Trygging.

### 175.05 Endurgjald

Endurgjaldið er í mesta lagi kr. 30.000 pr. lut og kr. 100.000 pr. skaðahending.

Mesta endurgjaldið í einum tryggingarári er kr. 300.000. Er tryggingarhæddin fyri innbúgv lægri enn kr. 300.000, er henda upphædd mesta endurgjaldið í einum ári.

Endurgjaldið fyri at skifta lásini út er í mesta lagi kr. 50.000 um árið.

### 175.06 Sjálvsábyrgd

Sjálvsábyrgdin er kr. 1.000 pr. skaðahending.

betri trygging

# Útleigutrygging til býli

*Ískoyti til tryggingartreytir fyri* ***Innbústrygging mars 2019.***

**Undantøk og avmarkingar**

Tryggingin fevnir ikki um:

**1.** skaða, sum Innbústryggingin fevnir um.

**2.** skaða, sum kemur undir undantøkini í treytunum fyri Innbústryggingina.

**3.** kosmetiskan skaða, t.d. litmun.

**4.** skaða, sum ikki ger lutin óbrúkiligan, t.d. skeinur, skónur, svíðing, dálking ella sprutting o.tl.

**5.** skaða, sum kemst av overving, skeivari konstruktión, skeivari uppseting, skeivari tilseting ella skeivari umvæling.

**6.** skaða sum kemst av sliti, aldri ella manglandi viðlíkahaldi.

**7.** skaða, sum er umfataður av aðrari trygging, garanti ella ábyrgd seljara.

**8.** at skifta lás, tá leigari hevur læst seg úti, um lykilin brotnar, verður skaddur ella um lykilin ikki virkar.

**9.** at skifta lás, tá lykilin er blivin burtur ella stolin og adressan til bústaðin lá saman við lyklinum.

**10.** hitapottar, sum verða blástir upp.